# Málskjúttin fær øl restina av lívinum

Ottakringer Brauerei – eitt ølbriggjarí í Eysturríki – bjóðar fyrsta málskjúttanum hjá Eysturríki í EM-spælinum ein vinning, sum er heldur sjáldsamur. Hesin fær ókeypis øl frá fyritøkuni restina av lívinum. - Hetta kann verða sparkið, sum er neyðugt, um liðið skal fáa viðgang. Hetta er møguliga rætta tileggjanin, sigur stjórin á fyritøkuni, Sigi Menz, sambært bold.dk



# Málini hjálpa neyðstøddum

Fyri hvørt mál, sum verður skotið í EM-endaspælinum, letur UEFA 30.000 krónur til hjálpararbeiði. Hetta hevur europiska fótbóltssamgongan gjørt í samstarv við altjóða deildirnar hjá Reyða Krossi. Til og við 23 mál, og tað gevur Reyða Krossi á leið 690.000 kr. Peningurin, sum kemur inn á hendan hátt, verður nýttur til hjálpararbeiða til frama fyri tey, sum hava fingið mein av landminum í Afghanistan, og so er væl bara enn størri orsøk hjá fóbóltsfjepparum at fagna álopsfótbóltinum.

# Sveisiski EM-dreymurin regnaði burt

**Í regnváta leikvøllinum í Basel sá Sveis leingi út til at fáa stig burturúr, men Turkaland vísti góðan neyvleika frammanfyri málinum, og endaði við at tryggja sær tepran 2-1 sigur**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*



*Regnið oysti niður á St. Jakob-Park, har føroyska landsliðið eisini hevur roynt seg. Á myndini síggjast turkiski sigursharrin, Arda Turan, og málverjin hjá Sveis, Diego Benaglio*
*Mynd: Polfoto/AP*

Tað vóru vónleys veðurlíkindi at leika í, tá ið botnliðini í bólki A, Sveis og Turkaland, brustu saman á St. Jakob-Park í Basel. Fótbóltsleikarar plaga tó ikki at leggja árarnar inn vegna veður, og hóast bólturin hevði trupulleikar við at ferðast, so varð dysturin fullførdur.

Í heimbýi sínum kundi Hakan Yakin tryggja Sveis, at teir sluppu til hálvleiks við 1-0 leiðslu. Hóast leikliga yvirvág til Sveis í seinna hálvleiki, so vóru turkar sera neyvir frammanfyri málið, og tað var hetta, sum avgjørdi dystin. Semih Sentürk javnaði við einum stútara eftir einum tíma, og hóast nógvar góðar møguleikar til Sveis at avgera dystin, so var tað hinvegin Arda Turan, sum í yvirtíðini tryggjaði Turkalandi øll trý stigini.

## Fíggindar

Sveis og Turkaland eru ikki júst tey landsliðini, ið hava besta samband við hvørt annað. 16. novembur 2005 leikti hesi lond EM-undankappingardyst á Sükrü Saracoglu-leikvøllinum í Istanbul. Ein dystur, sum endaði í sonnum ruðuleika, og fótbóltsvøllurin brádliga var átøkur einum boksiringi. Hópbardagin fekk tó avleiðingar fyri bæði londini, og bøtur við stórum upphæddum vórðu deildar út, umframt at nógvir leikarar máttu taka til takkar við longum leikbanni.

Dysturin í gjár bardi tó bara veðrið av, og varð væl avgreiddur. Eitt nú takkað einum kontantum dómara, slovakiska Lubos Michel, sum í løtuni telist millum heimsins bestu dómarar, og er ein av favorittunum til at døma EM-finaluna.

# Ronaldo trein á EM-pallin

**Umbidna stjørnan spældi ein avgerandi leiklut, tá ið hann og Portugal vunnu 3-1 á Portugal í gjár**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Portugal helt í gjár fram við góða spælinum, sum teir hava víst í EM higartil. Kekkia leitaði eftir góða spælinum, eftir at teir høvdu framt eitt heldur linligt avrik ímóti Sveis. Kekkia leikti væl til tíðir, men portugisiska maskinan koyrdi ov væl til at Kekkia kundi fylgja við

## Ronaldo á muni

Nógv verður tosað um, í hvørjum felag framtíðin hjá Ronaldo liggur. Tað er tó vist, at hann undir EM umboðar Portugal, og her hevur hann gjørt góðan mun. Eftir at hava sæð lítið til Ronaldo í fyrra dystinum, trein hann av álvara á EM-pallin, tá ið hann var við til at tryggja Portugal 3-1 sigurin á Kekkia í gjár. Hann skeyt sjálvur málið til 2-1, tá ið hann við fløtum skotið legði bóltin framvið Petr Cech. Hann var eisini heilin handan málinum til 3-1, tá ið hann vinarliga gav Ricardo Quaresma, eftir at teir báðir vóru púra leysir við kekkiska málverjanum.

## Flúgvandi FCK-leikari

Síðsta summar kunngjørdi FCK, at teir høvdu keypt kekkiska landsliðsleikaran, Libor Sionko, úr Glasgow Rangers. Í skotska felagnum fall hann ikki væl til, og valdi síðan at skifta til donska FCK. Her hevur hann staðið seg væl, og eisini við ársins EM hevur hann verið sera eyðsýndur á kekkiska landsliðnum.

31 ára gamli Libor Sionko hevur sáttmála við FCK fram til komandi summar, men heldur góða gongd hansara í EM fram, er væl hugsandi, at hann verður eftirspurdur í Evropa. Hetta plagar júst at vera eitt av vørumerkjunum hjá FCK.

## U17 landsliðið er úttikið

**Pætur Clementsen og Áki Johansen hava tikið út 18 leikarar, sum skulu umboða Føroyar á Aberdeen International Football Festival**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Tað hevur verið fastur táttur hjá U17 landsliðnum seinnu árini, at liðið fer á venjingarlegu í Aberdeen, áðrenn NM er á skránni. Talan er um eina altjóða kapping, at leikararnir skulu royna seg móti leikarum úr ymsum londum.

Venjararnir Pætur Clementsen og Áki Johansen hava tikið út teir 18 leikararnar, sum skulu umboða Føroyar í hesu kapping. Teir eru:

Teitur Gestsson, Sørmundur A. Kalsø, Helgi Samson, Johan Jacobsen, Ivan Joensen og Heðin Klakstein úr KÍ.

Bárður Hansen úr Víkingi. Jónberg á Mýrini, Andras B. Vágsheyg, Hallur Hansson, Gilli Sørensen, Jógvan Skeel Nolsøe, Páll Holm Jacobsen og Sørin N. Samuelsen úr HB. Eli F. Nielsen og Holgar Durhuus úr 07 Vestur. Bogi Petersen úr ÍF og Kristian Joensen úr NSÍ.

## Úr Real Madrid til KÍ

**Høvuðsvenjari á fótbóltsskúlanum hjá KÍ í ár verður Jesus Gutierrez, sum er ungdómsvenjari í spanska stórfelagnum Real Madrid**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Seinnu árini hevur KÍ fingið íblástur frá útlendskum venjaranum, sum standa fyri venjingunum á fótbóltsskúlanum, sum felagið skipar fyri. Og í ár er einki undantak.

Heimasíðan hjá KÍ skrivar, at Jesus Gutierrez, vanliga nevndur Guti, verður høvuðsvenjari á skúlanum í ár. Hann er ungdómsvenjari í spanska stórfelagnum Real Madrid.

Fótbóltsskúlin hjá KÍ verður í døgunum 12. og 13. august.